HEILSANIR

Hey, Norma!
Sum oftast ert tú still, men her ert tú vill. Hjartaliga tillukku við føðingardegnum. Alt tað besta ynskir
myndaeigarin

Óli Hans Danielsen
Góði, elskaði sonur, hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag, 10. nov. Alt gott í framtíðini ynskja
mamma og babba

Góða, elskaða Helen Ann
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum 8. nov. Jesus pápi signi framtíð tína.
Kærar heilsanir, mamma, pabba og Kristian

Góði Óli Hans
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag. Jesus pápi veri hjá tær.
Omma og abbi, mamba og gubbi

Hallo, tit øll!
Hendan deiliga kvinnan fyllir 40 ár, so nú er at liggja framvið. Hjartaliga tillukku við degnum 11. nov.
Heilsan, nú mást tú gita

Hey, hey, Heidi!
Hjartaliga tillukku við 14 ára føðingardegnum tann 7. nov. Nú gleðir tú teg mega nógv til leygardagin, ha!
Heilsan, ja gita hvør!

Góði Hallur
Hey, stóribeiggi! Tillukku á tínum 5 ára degi mánadagin. Takk fyri at tú ert so góður við okkum.
Nógvar mussar frá Rana og Tóka

Góði, elskaði sonur og beiggi
Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum 11. nov. og Jesus pápi signi framtíð tína. Vit elska teg.
Kærar heilsanir, mamma, pabba og Hans Fríður

Góði Kári
Tillukku við 20 ára degnum. Koyr nú varliga.
Heilsan, systir tín

Góði, elskaði Óli Hans
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag.
Heilsan, mostir

Góða Kristianna
Hjartaliga tillukku á 25 ára degnum 13. nov. ynskja
mamma og babba
Eisini ein heilsan til tín, góði Petur, á 6 ára degnum.
Heilsan, omma, abbi og Kristianna

Hvat?
Tað kann ikki passa, at eg longu eri 30 ár.

Góða Unnur
Hjartaliga tillukku við 40 ára føðingardegnum.
Heilsan, gita hvør
Bindiklubburin: -0)))

TIL SØLU
1 ára gamal vektbonkur við vektum til sølu fyri 800 kr. Nýprísur 1.400 kr.
Tlf. 373116

GASSGRÝTUR
Tvær stórar gassgrýtur til sølu og fýra innhruðar. Bara ein hevur karm.
Tlf. 252939

BLANDINGSBATTARÍ
Eitt blandingsbattarí til brúsu til sølu fyri 650 kr.
Tlf. 252939

TIL SØLU
H-vindeyga (h120 - b154,5), heitt-vatnstangi til vatn og sjuntventilur. Alt er óbrúkt.
Tlf. 332301

EYDNUHJÓL
verður í Ítróttarhøllini í Vestmanna sunnudagin 11. nov. kl. 16.00. Nógvir góðir vinningar so sum borðbátar, grindareiðskapur, olja, røst krov, karamellur o.m.a.
VÍF

FERÐAST SAMAN
til Keypmannahavnar 21. nov. og heim aftur 2. ella 3. des.
Tlf. 371654, e. kl. 17

TIL SØLU
WC kumma og hondvask (óbrúkt) til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 315570 e. kl. 17

ÁRSVEITSLA
Tann vælumtókta ársveitslan hjá Hósvíkar Róðrarfelag og Bygdarfelagnum Varðanum verður leygarkvøldið 24. nov. kl. 19. Góður matur og gott undirhald verður. Tað sera vælumtókta orkestrið Moonshots spæla til dans. Atgongumerkir á 175 kr. fáast í handlinum hjá Jóannesi til og við 18. nov. kl. 22.
Hósvíkar Róðrarfelag/-Bygdafelagið Varðin

HEILSANIR

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum við gávum, fjarritum, blómum og heilsanum, gjørdu hjúnabandsdag okkara 21. juli 2001 ógloymandi og hugnaligan.
Elisabeth og Svein Eliasen

Hey, Kári
Tillukku við 42 ára degnum og 20 ára starvsdegnum. Hav ein góðan dag.
Heilsan, N - 2 - 24
P.S. Her situr tú og hugsar um hvat tú skal gera, tá tú blívur stórur.

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu meg og foreldur míni á konfirmatiónsdegnum 7. oktober.
Heilsan, Fríða Beder

Góði, elskaði Kristin Oluf
Mostir, gubbin og Brynjar ynskja tær hjartaliga tillukku við 6 ára degnum í morgin. Jesus pápi signi framtíð tína.
Heilsan, Brynjar
P.S. Nú skulu sutturnar burtur!

Hjartans tøkk fyri sýndan heiður á hjúnabandsdegi okkara.
Blíðar heilsanir, Anna og Hans Mikkelsen

Karlon Winther
Hjartaliga tillukku við 40 ára degnum 10. nov. Babba, tú ert ikki so gamal. Abbadøturnar lata eisini heilsa.
Heilsan, vit øll heima

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara 10. mars 2001 til ein hugnaligan og ógloymandi dag. Takk fyri gávur, blómur og fjarrit.
Maria og Jóhann

Pætur Winther
Tillukku við 12 ára degnum 10. nov.
Heilsan, vit øll heima

Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

5 ferðir um vikuna

Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....
.....
.....
.....
.....
.....

Myndina aftur: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: .....
Bústaður: .....
Bygd/býur: ..... Tlf.: .....

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»Heilsanir«**